# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 14/2025: Uppskot til løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin)**

Ingilín Didriksen Strøm, Hervør Pálsdóttir, Karlot Hergeirsson og Eyðdis Hartmann Niclasen, løgtingsfólk, hava lagt málið fram tann 23. september 2025, og eftir 1. viðgerð tann 30. september 2025 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 7. og 28. oktober og 3. og 18. november 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við MEGD, Ljósmøðrafelag Føroya, Føroya biskup, Kommunulæknafelag Føroya, landsstýriskvinnuna í heilsumálum, Margit Stórá, saman við umboð fyri Gynækologiskt ambulatorium á Landssjúkrahúsinum, og landsstýrismannin í lógarmálum, Bjarna Kárason Petersen, saman við Familjufyrisitingini.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar.

**Ein minniluti** (Hervør Pálsdóttir, Ingilín Didriksen Strøm og Kristianna Winther Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Í Føroyum er tað sum at fara í eina labyrint, kemur ein kvinna í ta støðu, at hon ynskir at fáa fosturtøku. Kvinnur skulu finna runt í einum heilsuverki og samfelag, har allar kvinnur ikki eru eins stillaðar. Summar kvinnur fáa ta viðgerðina, tær hava vilja hava, og aðrar ikki. Kvinnur sjoppa lækna í vón um at sleppa gjøgnum nálareygað. Aðrar noyðast at keypa sær billettina av landinum á privatklinikk. Her er ikki rættartrygd, sjálvsavgerðarrættur ella javnrættur fyri kvinnur.

Í dag eru tað læknar, ið taka avgerðina. Læknarnir skulu taka avgerðina út frá eini lóg, ið er so gomul og ótíðarhóskandi, at hon ikki livir upp til javnviðgerð og rættartrygd hjá læknanum og kvinnuni. Sambært Læknafelag Føroya ynskja læknarnir ikki at taka avgerðina. Teir halda, at kvinnan er betur før fyri at taka røttu avgerðina fyri seg. Í kanning hjá Læknafelag Føroya hildu 89% av teimum, ið svaraðu, at kvinnan skal hava rættin at velja sjálv. Í hoyringunum og í samfelagskjakinum annars er komið fram, at sambandið millum lækna og kvinnu verður betri, tá kvinnan eigur rættin at velja sjálv. Tí tá hevur kvinnan betri møguleika at spyrja seg fyri og hugsa seg um. Læknin hevur betri møguleika at ráðgeva og tosa við kvinnuna, tí læknin skal fyrihalda seg til øðrvísi støður enn eftir verandi forboðslóggávu. Í dag møtir læknin ikki kvinnuni á sama hátt, sum viðkomandi møtir øllum øðrum patientum, tí her er ein lóggáva, ið spælir inn og ger, at læknin fyrst og fremst má ansa eftir ikki sjálv at verða dømd eftir lógini, heldur enn atlitinum at kvinnuni.

Fosturtøkur hava altíð verið framdar og fara altíð at verða framdar. Trygt ella ótrygt. Lógliga ella ólógliga. Her í landinum ella aðrastaðni. Tað, sum er kjarnin í lógaruppskotinum, er ikki, um fosturtøkur frameftir skulu fremjast ella ikki. Kjarnin snýr seg um, hvør skal taka avgerðina. Avgerðarrætturin verður fluttur frá læknanum til kvinnuna, tí hvør er betri enn kvinnan at taka endaligu avgerðina? Hvør er best ílatin og kennir kvinnuna og hennara lív, umstøður og viðurskifti betur, enn kvinnan sjálv?

Aftur at hesum uppskotinum og tí nærum einsljóðandi uppskotinum, ið landsstýrismaðurin í lógarmálum legði fram í 2024 (løgtingsmál 88/2023), er bert einaferð uppskot lagt fram um broytingar í lógini. Tað var eitt uppskot um eitt totalt abortbann. Øll løgtingsfólk hava síðani 1956 havt møguleikan at leggja fram uppskot um at betra og broyta lógina. Tað tykist eins og ongin í Løgtinginum heldur, at lógin frá 1956 er nøktandi. Tó hevur hugurin at broyta lógina ikki verið til staðar.

Tað vil siga, at ongin, uttan Miðflokkurin, sum vil banna fosturtøkum, hevur tikið stig til at broyta ásetingarnar um fosturtøkumarkið á 16 vikur, ásetingarnar um, at fosturtøkur kunnu loyvast grundað á ein illgruna um epilepsi ella "åndssvaghed" ella ásetingarnar um, at maðurin, sum hevur gjørt kvinnu við barn, kann fáa fongsulsrevsing, um hann ikki vil standa við sína ábyrgd, og hetta er ein viðvirkandi orsøk til, at ein kvinna velur at fáa abort. Eftir orðaskiftinum við 1. viðgerð at døma, er hetta ikki, tí tingfólk ikki hava eina meining um málið – heldur tvørturímóti eru meiningarnar so sterkar, at uppskotssetararnir verða lagdir undir at vera drápsfólk.

Hesin minnilutin heldur, at tíðin er búgvin at dagføra fosturtøkulógina í Føroyum. Vit mugu síggja veruleikan í eyguni. Vit mugu ikki útflyta hetta, eins og vit hava gjørt við onnur mál gjøgnum tíðina. Vit yvirtóku málsøkið *familjurættur* í 2018. Tíðin er til, at vit taka ábyrgd av hesum málinum nú. Hesin minnilutin heldur, at uppskotið, sum er lagt fram, setur góðar og virðiligar karmar um fosturtøku.

Við hesum uppskotinum verður fosturtøka loyvd til viku 12. Eftir viku 12 verður tað eitt fakligt samráð, ið skal taka avgerð um fosturtøku – og bert í heilt serligum førum verða fosturtøkur framdar eftir viku 12. Í dag verða 95% av øllum fosturtøkum í Føroyum framdar áðrenn viku 12. Onki bendir á, at hetta fer at broytast. Seinabortir eru ógvuliga fáar í tali, og tá tær umræður, verður altíð fingin til vegar ein meting aftrat úr danska heilsuverkinum um, hvør støðan er, og hvat tilmæli skal vera. Hesin minnilutin heldur tað eisini vera gott, at uppskotið ásetur, at kvinnan skal hava í boði óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu fyri og eftir inntrivið.

At seta markið á viku 12 metir hesin minnilutin vera hóskandi. Hetta gevur kvinnuni tíð at hugsa seg um, hvørja avgerð hon metir verða besta fyri seg og sínar umstøður, eins og tað hóast alt er so tíðliga í viðgongutíðini sum gjørligt.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Ein annar minniluti** (Helgi Abrahamsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

"Føroyar skulu vera heimsins besta barnaland." Tað var einaferð eitt vallyfti hjá einum politiskum flokki, og seinni hevur tað eisini verið ein málsetningur hjá landsstýrinum. Arbeiðast skuldi fyri tey, sum ikki hava eina sterka rødd í samfelagnum.

Hetta er ein góður málsetningur!

Men fyrsta treytin fyri, at Føroyar kunnu vera eitt gott barnaland er, at øll børn fáa loyvi til at verða fødd - uttan mun til sosiala støðu, brek, rasu, húðarlit, kyn, etniskan uppruna o.s.fr. Fær eitt barn ikki rættin at verða føtt, so kann alt annað gera tað sama.

Sjálvandi kunnu truplar støður vera orsøk til, at alt ikki er so svart og hvítt, sum vit vildu ynskt, at tað var. Tí hava vit eina fosturtøkulóg sum í síni tíð skuldi lofta hesum serligu avbjóðingunum. Tann lógin er gomul og átti fyri langari tíð síðani at verið dagførd.

Hetta uppskotið er ein munandi liberalisering samanborið við galdandi lóg. Summi hava víst á, at onkur treyt verður herd í mun til lógartekstin í gomlu lógini (sum í stóran mun tó ikki verður praktiseraður), og almenna Kringvarpið fór so langt sum at kalla uppskotið: “Málið um at seta markið fyri fosturtøku úr 16 vikum niður í 12 vikur.” Hetta er ein grov villleiðing. Málið snýr seg ikki um at stytta markið. Hetta er ein liberalisering, sum tekur øll rættindi frá barninum.

Tað sum í galdandi lóg eitur 16 vikur (í praksis 12 vikur), er markið fyri fosturtøku orsakað av teimum serligu umstøðunum – talan er ikki um fría fosturtøku.

Tað sum í hesum uppskotinum eitur 12 vikur, er markið fyri, hvussu leingi tað skal vera loyvt at velja fosturtøku uttan nakra kravda grundgeving yvirhøvur. Harafturat skal bera til at fáa fosturtøku framda eftir 12. viku undir serligum viðurskiftum.

Afturat hesum skal eisini vera møguligt at fáa fosturtøku framda, eftir at barnið verður mett at vera lívført (tað vil siga, at útlit eru til, at barnið kann yvirliva í øllum førum í nakrar vikur eftir inntrivið).

Sambært § 5 kann eitt lívført fostur verða tikið, um umstøðurnar í § 3, nr. 3 avgerandi tala fyri tí. Sambært viðmerkingunum til § 5 kann hetta bara verða gjørt, um fostrið er álvarsliga sjúkt, ella hevur álvarslig avskap. Men í sjálvum lógartekstinum verða sjúka og avskap ikki nevnd sum einasta treyt. Har stendur, at um fostrið er lívført, kann loyvi til fosturtøku verða givið, um umstøðurnar nevndar í § 3, nr. 3 avgerandi tala fyri tí.

Løgfrøðiliga verður eitt fostur mett sum eitt barn, um í minsta lagi 22 fullar vikur av viðgongutíðini eru farnar. Sostatt ber til at fáa fosturtøku framda heilt fram til viku 23, um barnið ikki væntast at fáa “vanligt virkisføri”.

§ 3, nr. 3 sigur, at fosturtøka kann millum annað verða framd orsakað av ættarbregði. Tað er sostatt ikki ein treyt, at sjúka skal vera staðfest hjá barninum, men talan kann vera um eitt púra frískt barn, sum verður tikið úr móðurlívi, tí mett verður, at tað møguliga kann hava eina álvarsliga sjúku.

Fosturtøka kann eisini verða loyvd eftir 12. viku orsakað av sosialum umstøðum hjá kvinnuni. Um viðgongutíðin, føðingin ella umsorganin fyri barninum má metast at elva til eina álvarsliga byrðu fyri kvinnuna, kann loyvi verða givið til fosturtøku. Tað er ikki ein treyt, at talan skal vera um nakran vanda fyri heilsuna hjá kvinnuni. Eisini spurningurin um onnur børn í familjuni telur við – um tey fáa “eina fullgóða uppaling,” sum tað eitur í viðmerkingunum til uppskotið.

Men hvat so um pápin er førur fyri at taka sær av barninum ella øðrum børnum? Er tað bara mamman, sum hevur ábyrgdina av børnum, húsi og heimi?

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, at í sambandi við fosturtøku skulu atlit takast at bæði kvinnuni, fostrinum, manninum og heilsustarvsfólkum. Vit hava spurt í nevndini, hvørji atlit verða tikin at fostrinum, men tað er ringt at vísa á nakað, sum er til fyrimunar fyri barnið, tí endamálið er at gera tað léttari at fáa fosturtøku, og ein fosturtøka er ongantíð ein vinningur fyri barnið!

Har er ein umhugsanartíð, sum onkur heldur, at barnið kann fáa fyrimun av, men tað er bara ein fyrimunur, um umhugsanartíðin endar við, at fosturtøkan verður vald frá. Fyri barnið er tað ikki ein fyrimunur, um fosturtøkan verður framd í eini viku heldur enn í eini aðrari viku.

Atlit at pápanum eru eingi. Tað sigur seg sjálvt, at tá lógin hevur til endamáls at geva mammuni allan avgerðarrættin, so verður einki eftir til pápan.

Í viðmerkingunum til uppskotið stendur, at um umsóknin um fosturtøku er grundað á, at barnið er álvarsliga sjúkt ella vandi er fyri, at barnið fær álvarsliga sjúku, undir hesum álvarslig avskap, skal læknin kunna kvinnuna um møguleikan fyri at fáa meira kunning og ráðgeving frá serlæknum og hjá viðkomandi myndugleikum og felagsskapum, so sum hjá MEGD, einum brekumboði, Almannaverkinum o. ø.

MEGD hevur boðað frá, at tey eru als ikki áhugað í at ráðgeva í sambandi við fosturtøku, tí hetta vil skerja rættin hjá MEGD at virka sum tað skal.

MEGD ynskir, at øll skulu hava sama rætt at verða fødd – eisini tey sum bera brek, og um “kvinnan skal ráða yvir egnum kroppi”, so eigur tað eisini at galda fyri kvinnuna, sum ber brek.

Tí hvat er eitt brek? Tað er í stóran mun ein spurningur, um samfelagið klárar at lofta persóninum við sínum breki. Í nógvum førum kann heilivágur ella ein protesa vera nóg mikið til, at fólk sum bera brek verða vælvirkandi borgarar.

Nógvar seinfosturtøkur í øðrum londum verða framdar orsakað av, at fostrið ber brek. Skanningar av fostrum seta ofta foreldur í truplar støður, tí tey skulu velja millum eitt barn við breki ella fosturtøku. Talan nýtist ikki at vera um álvarslig brek, tí í ársfrágreiðingum frá danska Abortankenævnet sæst, at til dømis børn við klumpfóti verða vald frá við seinfosturtøkum, hóast tað ber væl til at liva eitt gott lív við klumpfóti.

Tað kann ikki vera rætt, at eitt framkomið, mentað og nýmótans samfelag velur ímillum, hvør er nóg fullkomin til at verða føddur, og hvør skal veljast frá.

Og tað sama er galdandi fyri spurningin um, hvør skal fáa loyvi at seta børn í verðina. Í sonevnda “Snyrilsmálinum” í Grønlandi hevur verið funnist at, at kvinnur við breki – uttan teirra samtykki og møguliga eisini uttan at tær vistu tað sjálvar, fingu snyril ísettan, tí myndugleikarnir ynsktu ikki, at tær fingu børn. Talan var um okkurt slag av ættarreinskan.

Sambært hesum uppskotinum skal verða loyvt at fremja fosturtøku, um kvinnan orsakað av likamligari ella sálarligari sjúku ella sálarligum menningartarni ikki megnar at hava umsorgan fyri barninum. Er kvinnan ikki før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, kann samráðið geva loyvi til fosturtøku eftir umbøn frá einum serligum verja. Hetta minnir óhugnaliga nógv um støðuna viðvíkjandi snyrilsmálinum. Kvinnan skal ráða yvir egnum kroppi, men ikki allar kvinnur. - Ikki tær sum bera brek.

Spurningurin um fosturtøku er bæði likamligur, sálarligur og andaligur. Rættarnevndin innkallaði tí Føroya biskup, fyri at spyrja hann um ta andaligu síðuna av hesum málinum – um ta kristnu uppfatanina av fosturtøkuspurninginum. Biskupur læt eisini nevndini eitt skjal, ið liggur sum nevndarskjal í løgtingsmálinum.

Tað sum hann segði, og sum stendur í skjalinum, er í stuttum, at:

- Gud er skapari himins og jarðar
- Mannalívið er heilagt frá gitnaði til grøv
- Menniskjan er halgað og sett til at umsita og ansa eftir skapanarverkinum
- Og at taka lív ella avmarka lívið og umstøður lívsins er ikki heimilað menniskjum

Biskupur sigur eisini: "Tøka av lívi samsvarar ikki við grundarlagið undir mínari kristnu trúgv. Vit hava fingið eina uppgávu við atliti at lívinum, ið vit mega røkja við nærlagni teimum livandi at frama."

Hann legði tó eisini dent á, at saman við rættinum til lívið fylgir eisini ein ábyrgd, og hann heitti á politisku skipanina um at bera so í bandi, at komandi mammur fáa allar hugsandi sømdir, so tær kenna tað gleðiligt heldur enn avbjóðandi at vera við barn og gerast mamma.

Eins og MEGD vísti biskupur eisini til § 3 nr. 3 í uppskotinum, sum hann segði "skurrar í oyrunum", tí tað minnir alt ov nógv um útreinskan.

"Fólk við breki hava sama mannvirði sum vit onnur. Mælandi og ómælandi hava rættin at verða hoyrd og rættin at vera til," segði hann.

"Tað verður kallað frítt val, men tað er ikki eitt frítt val. Okkara umstøður, onnur menniskju og samfelagið ávirka okkara val - tí er valið í veruleikanum ikki frítt. Um ein kvinna kennir seg noydda til fosturtøku vegna sosialar umstøður, so ber ikki til at siga, at valið er frítt," segði Føroya biskupur, sum mælti til eina "null-hugsjón" viðvíkjandi fosturtøkum.

Eitt nógv brúkt argument fyri hesum uppskotinum hevur verið "trygg fosturtøka". Víst verður á, at um fosturtøkulógin er ov strong, er vandi fyri, at kvinnur velja alternativar loysnir, ið kunnu vera hættisligar.

Men her vísa hagtøl, at hesin pástandurin er als ikki rættur. Deyðatíttleikin millum kvinnur, sum doyggja annaðhvørt meðan tær ganga við barni ella av fosturtøku er ikki hægri í londum við strangari fosturtøkulóg, enn í londum ið loyva fríari fosturtøku. Til dømis hevur Pólland, sum hevur eina av strangastu fosturtøkulógávum í Europa, eitt av lægstu tølum fyri deyðatíttleika í viðgongutíð ella í sambandi við fosturtøku.

Pástandurin um, at liberalisering av fosturtøkulógini fær talið av fosturtøkum at lækka, er eisini skeivur. Hagtøl úr okkara grannalondum vísa, at talið av fosturtøkum fyri hvørji 1.000 fødd børn er munandi hægri, har frí fosturtøka er galdandi, samanborið við støð, har strong fosturtøkulóg er galdandi. Neyvan er lóggávan einasta orsøkin til hendan munin, men staðfestast má, at øvugi pástandurin er tikin úr leysum lofti. Pástandurin um, at kvinnur í Føroyum, orsakað av verandi lóggávu, keypa ólóglig evni fyri at taka fostur er ei heldur skjalfestur nakrastaðni.

Hesin minnilutin tekur undir við, at galdandi lóg um fosturtøku treingir til ábøtur, men vit halda ikki, at hetta uppskotið er eitt gott alternativ til verandi lóg. Hetta uppskotið byggir á eina gamla danska lóg, sum er bara 18 ár yngri enn galdandi lóg í Føroyum.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður sagt, at eitt av endamálunum við uppskotinum er at hava fosturtøkutalið so lágt sum gjørligt. Hesin minnilutin kennir seg sannførdan um, at hetta uppskotið, um tað verður samtykt, fer at økja um talið av fosturtøkum í Føroyum, eins og líknandi lógir hava gjørt í okkara grannalondum.

Hetta uppskotið er næstan meinlíkt uppskotinum í løgtingsmáli 88/2023, sum Løgtingið feldi í fjør. Nú, meðan ein lítil tíðaravmarkað broyting er í samansetingini av Løgtinginum, verður málið lagt fram í skundi, tí ein møgulig undirtøka kann vera burtur aftur longu um stutta tíð. Hetta má sigast at vera ein løgin arbeiðsháttur, sum leggur upp til, at lógin skal verða broytt frá valskeiði til valskeið, alt eftir hvussu samansetingin er í Løgtinginum frá eini løtu til aðra.

Við hesum viðmerkingunum tekur hesin minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Ein triði minniluti** (Henrik Old) heldur lógaruppskotið liggja langt frá javnaðarhugsjónini, og at politiska skipanin skal taka ráðini frá bispi til sín, tá hann í skrivi, sum er latið nevndini, heitir á politisku skipanina um at geva komandi mammum allar hugsandi sømdir, sosialar sum fíggjarligar, so tær kenna tað gleðiligt heldur enn avbjóðandi at vera við barn og gerast mamma.

Hesin minnilutin er eisini samdur við bispi í, at vit eiga at siga ja til lívið, og at lívið krevur solidaritet. Í hesum sambandi skal verða víst á, at tað í Barsilsgrunninum við ársenda 2024 vóru 85 mió. kr., og at hendan upphæddin 1. september 2025 var komin upp á 100 mió. kr. Her er ovmikið at taka av, og hesin minnilutin fer tí skjótast gjørligt at leggja fyri tingið uppskot til samtyktar, har heitt verður á landsstýrið um at leggja fram lógaruppskot við tí endamáli at geva kvinnum, sum eiga fyrstu ferð, eina munandi eingangsupphædd.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Rættarnevndin, 25. november 2025**

| | | |
|---|---|---|
| Hervør Pálsdóttir<br>forkvinna | Helgi Abrahamsen | Ingilín D. Strøm |
| Kristianna W. Poulsen | Henrik Old | Steffan Klein Poulsen |

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur